# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Endurnýggjaður flokkur

Sambandsflokkurin hevur havt landsfund og á fundinum gjørt fundarsamtykt, sum vísir hvørja politiska leið flokkurin fer at halda. Eisini vísir samtyktin hvørji mál, ið hesin stóri andstøðuflokkur leggur høvuðsdentin á. Landsfundurin gjørdi samtykt í fimm høvuðspunktum, og áhugavert er, at fyrsta punktið í samtyktini snýr seg um bleytu virðini. Hetta snýr seg við øðrum orðum um vælferð, heilsumál, almannamál og mentan. Samtyktin vísir við øðrum orðum aftur til valstríðið, ið hjá Sambandsflokkinum eins og hjá hinum stóru flokkunum snúi seg um bleyt virði. Landsfundarsamtyktin nevnir bert ríkisfelagsskapin sum eitt slag av fortreyt fyri vælferðini í og við, at hendan skal tryggjast millum annað við góðari røkt av ríkisfelagsskapinum. Hetta má sigast at vera nakað av eini niðurstóning av høvuðsmáli Sambandsfloksins. Sambandið við Danmark tykist ikki longur at vera mál í sjálvum sær, men ein síða av vælferðini. Hetta minnir ikki sørt um støðu Javnaðarfloksins í seksti- og sjeytiárunum.

Men annars er tað ítøkiligi vælferðarpolitikkurin, sum er á skránni: Her verður talað um, at bíðitíðin fyri at fáa viðgerð á sjúkrahúsi skal styttast niður í tveir mánaðir, at sálarliga sjúk og menningartarnað skulu hava ein gevandi og mennandi gerandisdag. Víðari snýr fundarsamtyktin seg um trivnað, um livikor, útbúgving og mentan, ið skulu raðfestast høgt, ja hægri enn sjálvur ríkisfelagsskapurin kann ein lesa millum reglurnar. Samtyktin umrøður kvinnuundirskotið, ið, sum tað verður sagt, skal minkast við at geva teimum somu tilboð, sum tær hava í hinum partinum av ríkisfelagsskapinum. Hetta er sera áhugavert, um hetta merkir, at Sambandsflokkurin er sinnaður at fara eins langt í eitt nú etiskum spurningum, sum bróðurflokkurin í Danmark.

Onnur mál í samtyktini snúgva seg ítøkiliga um hægru útbúgvingarnar, har tær maritimu fáa serstaka umrøðu, og ein altjóða matvøruútbúgving skal setast á stovn á Fróðskaparsetrinum. Altjóðagerð er í fokus og Føroyar skulu hava økta luttøku í Norðurlandaráðnum, sess í ST, og samráðingar skulu takast upp við ES um treytir fyri ES-limaskapi við undantøkum. Orka og umhvørvi fylla nógv, og Føroyar í 2025 skulu verða millum fremstu lond, tá talan er um varandi orku, og myndugleikar í høvuðsheitum skulu fylgja tilráðingum frá fiskifrøðingum. Samanumtikið ein sera áhugaverd landsfundarsamtykt, sum lýsir ein nútímansgjørdan og endurnýggjaðan Sambandsflokk merktur av einum nýggjum ættarliði av ungum akademikarum og ungum vinnulívsmonnum.

**Sosialurin**

## 1000000 = 0

### - Orsaka... og takk!



**HUGIN EIDE, BÓKAVØRÐUR, TÝÐARI, RITSTJÓRI V.M.**

hugin@sprotin.fo

**Ein umbering til Føroya Løgting og Landsstýri**
Eg biði tykkum so miriliga orsaka...

Orsakið at eg og onnur gleddust, tá eitt einmælt løgting á sumri 2007 samtykti at játta 1.000.000 krónur til bókmentatýðingar í 2008.

Orsakið at vit hildu tað vera ov gott til at vera satt.

Orsakið at vit hildu tað vera í tráð við Visión 2015.

Orsakið at vit halda at føroyingar eiga at kunna lesa heimsbókmentir á føroyskum, heldur enn á donskum.

Orsakið at vit tískil settu sjøtul á eina stóra týðingarverkætlan við regluligum útgávum av heimsbókmentum í føroyskari týðing.

Orsakið at vit settu fólk í gongd at umseta amerikanskar, íslendskar, norskar, svenskar, finskar, enskar, týskar, russiskar, spanskar skaldsøgur.

Orsakið at eg eisini havi gjørt eitt forlag í Danmark til tess at geva føroyskar bókmentir út á donskum.

Orsakið at vit hildu, at tit hildu, at týðingar til føroyskt og úr førosykum ikki longur bara skuldu dúva upp á útlendskar grunnar.

Orsakið at vit hildu, at tit nú vildu vísa í verki, at eisini føroyskir politikarar sjálvir halda føroyskt mál og føroyskar bókmentir hava týdning.

Orsakið at vit søktu og fingu týðingastuðul frá Mentanargrunni Landsins.

Orsakið Mentanargrunnin, at hann helt at hann átti teir pengarnar, sum tit høvdu billað honum inn at hann átti.

Takk at tit nú hava gjørt okkum greitt, at tað var alt samalt ov gott til at vera satt.

Takk at tit hava gjørt okkum greitt, at tit ikki meina Visión 2015, Málstevnuálit og tílíkt í álvara.

Takk at tit fingu steðgað hesum týðingafjasinum, áðrenn tað breiddi seg.

Takk at tit hava gjørt okkum greitt, at føroyingar eiga ikki at kunna lesa heimsbókmentir á føroyskum.

Og at tit ikki halda føroyskar bókmentir vera verdar at útflyta.

Orsakið at eg lærdi í barnaskúlanum, at eitt tal er absolutt, at ein millión = ein millión.

Orsakið at eg helt, at lóg er lóg.

Takk at tit nú hava lært meg, at ein millión = null.

Takk at tit nú hava lært meg, at lóg er lygn.

Orsakið at eg og onnur trúðu tykkum. Vit skulu ongantíð gera tað aftur!

**»Føroyar eru fyrimynd í alheims samfelagnum. Her blóma mentan og list. Vælvirkandi skipanir borga fyri dygd og nýskapan...«**
**Visión 2015, s. 183**

**»Menningarætlan verður gjørd fyri føoyska bókaútgávu. Ætlanin skal fevna bæði um føroyskar bøkur og týðingar til føroyskt og úr føroyskum. Útgávuvirksemið og marknaðarføringin verða fíggjað við føroyskum og norðurlendskum stuðli«.**
**Visión 2015, s. 188**

## Dálking av russiskum skipum í Føroyum



**SÁMAL PETERSEN**
Kaldbak

Inni á Sundi á Kaldbaksfirði hava í fleiri ár ligið russiskir trolarar við kai so at siga alt árið runt. Í hesari vikuni hava ligið trý skip, og tey liggja har enn. Larmurin er eitt, men lukturin er ofta ikki tespiligur. Stór roykskýggj standa upp og leggja seg sum eitt teppi yvir allan fjørðin. Tað luktar av brendum bensini, og fari eg framvið Sundi við bili, fái eg andaneyð. Kundi hugsað mær at sett hesar spurningar fram til avvarðandi mynduleikar.

Hvussu nógv dálka teir russisku trolararnir tilsamans í Føroyskum sjógvi?

Hvussu nógv prosent er hetta av CO2 útlátinum í Føroyum, ella er hetta ikki roknað við?

Fáa vit so nógv burtur úr hesum skipum í føroyskum sjógvi, at prísurin fyri hetta "bara" er eitt risastórt útlát av royki?

Hvar eru umhvørvismyndugleikarnir?

Hvar er Tórshavnar kommuna hesum viðvíkjandi?

Skulu havnagjøld og privat áhugamál avgera, hvussu heilsan hjá okkum og serliga okkara komandi ættarliðum skal verða?

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.